







# Sethús úti á Norðasta Horni

Húsini standa væl fyri í barnavinarliga umhvørvinum á Norðasta Horni. Stutt er til Havnadal har umhvørvið hevur nógvar góðar, smáar og hugnaligar gongugøtur, so møguleiki er fyri gongutúrum í vøkru náttúruni. Ríðifeløgini hava felagsøki, ríðihøll o.a. í Havnadali. Stutt er til barnagarðin, fótbóltsvøllin og spæliplássið. Gott bussamband er inn til býin. Húsini eru í einari hædd og hava ein stóran og góðan hjall, dur, gongd, gestavesi, vaskikjallara, køk, stovu, fýra kømur og eitt baðirúm. Vaskikjallarin hevur flísar á gólvinum. Í baðirúminum er brúsa og baðikar og hiti í gólvinum. Brenniovnur er í stovuni.

Eitt stórt óinnrættað ovastaloft er í húsinum við nógvum møguleikum. Eitt bilhús á 26 fermetrar hoyrir eisini til húsini. Framman fyri bilhúsið og høvuðsdyrnar eru flísar lagdar á túnið. Grundøkið er stórt, 607 fermetrar og gott pláss er rundan um húsini.

Tú fært meira at vita um húsini við at ringja til Skyn á tlf. 357400.

**Fakta:**

Adr. Skemmingsgøta 2, Tórshavn

| | |
|---|---|
| Byggiár: | 1986 |
| Hæddir: | 1 |
| Stødd innan: | 140 fermetar |
| Grundøkið: | 607 fermetrar |
| Prísuppskot: | kr. 2.400.000 |

skyn

**Tlf. 357400 · Tórsgøta 16 · www.skyn.fo**